## Bjørk á danska landsliðið



Dimmalætting skrivar í morgun, at Bjørk Herup Olsen fer at umboða Danmark í norðurlendskum landsdysti í Bergen í døgunum 16. og 17. august. Hóast landsliðið er eitt felags danskt/íslendskt lið, so var tað føroyingurin sum átti bestu tíðina á 3000 metra teininum. Orsaka av, at Føroyar ikki eru blivnar limir í altjóða sersambandinum fyri frælsan ítrótt, og undir verandi umstøðum ikki hava møguleikan til tess, so kunnu føroyingar umboða onnur lond. Frælsur Ítróttar Føroyar stuðlar Bjørk í royndini at fáa betri úrslit, og vónandi kann hendan úttøkan motivera hana til at halda fram við miðvíða arbeiðinum.

## Henrik hevur góðar vónir

Um vikuskiftið fer bólturin aftur á rull í næstbestu donsku deildini. Við føroyskum eygum verður tað serliga áhugavert at fylgja Toda Jónsson og FC Amager, men eisini er spenningur um, hvussu fyrrverandi føroyski landsliðsvenjarin, Henrik Larsen, fer at standa seg í venjarasessinum hjá Lyngby. – Vit hava fleiri dugnaligar leikarar, men tað er óheppið, at Holst ikki hevur verið við í fyrireikingunum, orsaka av skaða. Vit hava góðar vónir til kappingarárið, og vit byrja sunnudagin móti FC Amager. Um vit ikki geva okkum fult út, so tapa vit dystin, sigur Henrik Larsen við heimasíðuna hjá Lyngby.

## Væl uppiborin sigur

Ungi Róaldur Jacobsen var uttan iva ein av dagsins monnum á B36-liðnum, og hann var fegin um sigurin. - Vit spældu ein ómetaliga góðan dyst. Vit arbeiddu allir hart fyri hvørjum øðrum, og sigurin var væl uppiborin, segði Róaldur eftir dystin, og peikar serliga á verjupartin sum ein umráðandi lið í sigrinum. B36-hópurin hevur als ikki smakkað nakra summarferiu, men hetta hungraðu teir ikki, ið hvussu er ikki Róaldur, eftir. - Eingin summarferia á skránni, men vit eru ikki troyttir. Alt koyrir bara, og lagið í hópinum er, sum altíð, gott, staðfesti Róaldur. Sunnudagin verður dystur um Havnina, tá ið B36 og HB bresta saman í Gundadali. Eru tit í B36 klárir til uppgávuna? - Um man ikki er klárur at spæla ímóti HB, so er man ongantíð klárur, segði Róaldur Jacobsen at enda.

## Betra liðið vann

Innskifti B71-áleyparin, Høgni Midjord, var við til at seta ferð í B71-álopið. Hann tók soleiðis saman um dystin: - Teir spæla ikki serliga væl, og eg haldi, at tað vóru vit, sum vóru vánaligir. Vit vóru ikki nóg uppsettir, og gjørdu alt ov nógvar skeivar avleveringar, segði Høgni, og var serliga harmur um, at Gudmund S. Nielsen ikki var tøkur til dystin. B71-leikararnir hava havt eina viku langa summarferiu. Høgni helt ikki, at tað var tað, sum spældi inn. Vit spurdu hann, hvat teir skulu gera, tá ið teir vitja Víking í Gøtu sunnudagin. Svarið var greitt: - Arbeiðshandskarnar uppá!



*Leikferðin í dystinum var høg. Til tíðir kanska ov høg, og nógvir bóltar fóru út av vøllinum*
*Savnsmynd*

# Brotsspark avgjørdi á Sandi

*B71*

*B36*

**Eftir tríggjar sigrar á rað steðgaði sigursrøðin hjá B71. B36 sá út til at hava fingið mest burturúr summarsteðginum, og vann tepur, men uppiborið, 1-0**

FÓTBÓLTUR
*Pætur Albinus*
*patur@sosialurin.fo*

B36 hevur als ikki hildið summarfrí, eins og fleiri av hinum liðunum í Formuladeildini hava. Havnaliðið hevur havt trupla uppgávu í UEFA Cup, har teir taptu tilsamans 0-3 fyri danska Brøndby IF. B71-leikararnir høvdu eina stutta summarferiu upp á eina viku, og fleiri leikarar hava verið uttanlands.

Øll ting kundu spæla inn til uppgerðina á Sandi mikukvøldið, men greitt var fyri øllum, at B71 ongantíð skal undirmetast heima á Sandi.

B71 mátti vera vandamesta leikara teirra, Gudmund S. Nielsen, fyri uttan, umframt at liðskiparin, Eirikur Poulsen, heldur ikki var við. Hjá B36 vóru Herbert í Lon Jacobsen og Súni Olsen ikki vóru tøkir.

### B36 við yvirlutan

Gestirnir settu seg á dystin tíðliga í dystinum. B36 er væl fyri tekniskt, og spælið fleyt væl betur enn spælið hjá B71, sum fyrstu løtuna hekk illa saman. B71 royndi seg mest við longum bóltum fram til Sunday, men lítið kom burturúr.

Samstundis mátti staðfestast, at lítið kom eisini burturúr hjá B36. Teir høvdu bóltin nógv, men álopini endaðu oftast við mistum bóltum ella langskotum. B36 royndi seg nógv við at senda innlegg innfyri, og tað var eisini eitt av hesum, sum tryggjaði teimum brotsspark eftir góðum hálvum tíma. Símun Hansen fekk hondina á bóltin, og so kundi Klæmint Matras leggja B36 á odda 1-0 frá brotssparksblettinum.

Korterið til hálvleiks var lítið undirhaldandi. Regn kom yvir áskoðarafjøldina, og á vøllinum var ikki nógv at hyggja eftir. Størsta hóttanin hjá B36 var eitt vandamikið og væl skrúvað frísparksinnlegg, sum streyk beint fram við málinum. Besta B71-møguleikan átti Clayton, sum eftir at hava sneitt tveir B36-arar av, royndi seg við nøskum skoti, sum B36-málverjin tó vardi fyri.

Hálvleiksstøðan var 1-0 til B36.

### B71 kýtti seg – rakk ikki

Í seinna hálvleiki kom B71 nógv betur við. Hetta er ein kend søga, og sæð aftur hevur B71 staðið seg nógv betur í seinnu helvt av øllum dystum í ár. Heldur enn at B36 hevði mist tamarhaldið, so var tað B71, sum hevði tikið tað frá teimum. B71 helt longri upp á bóltin, og hetta tók møguleikan fyri B36-trýsti burtur.

Stutt inn í seinna hálvleik var um reppið, at Símun Hansen gjørdi tað gott aftur fyri teir gulu. Skotið hjá honum, sum broytti kós eftir at hava rakt ein B36-verjuleikara, endaði á yvirliggjaranum. Hetta var eisini tað tættasta, sum B71 skuldi koma í dystinum.

Jákup á Borg gjørdi comeback í B36-búnanum í seinna hálvleiki, og hetta var til mikla frøði fyri uppmøttu B36-viðhaldsfólkini. Hann hevur ikki vant nógv seinastu tíðina, men hann sá út til at fella væl inn á liðið.

Leikferðin í dystinum var høg. Til tíðir kanska ov høg, og nógvir bóltar fóru út av vøllinum. Báðir verjupartarnir stóðu sera stinnir, og hetta bar við sær, at fáir veruligir málmøguleikar vóru at síggja.

B71 royndi at trýsta í seinastu minuttunum, men einki mál í seinna hálvleiki, og við 1-0 sigrinum fekk B36 øll trý stigini við sær aftur til Havnar. Hetta lyftir teir frá einum 5. plássi og upp á eitt deilt 2. pláss við NSÍ. Við ósigrinum dettur B71 nú aftur niður um niðurflytingarmarkið, og er nú at finna á 9. plássi.